*Landssjúkrahúsið stendur at rapa og krevur álvarsligar ábøtur:*

# Átrokandi neyðugt at leggja 500 milliónir krónur á borðið

*Bygningarnir hjá Landssjúkrahúsinum eru í so ringum standi, at tað er neyðugt at gera nakað munagott heilt skjótt, annars fara teir heilt fyri skeytið*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Landssjúkrahúsið stendur rætt og slætt at rapa og verður ikki farið undir miðvísar ábøtur nú, fara bygningarnir heilt fyri skeyti, sigur bygginevndin. Neyðugt er at seta heilar 500 milliónir av til ymsar íløgur á Landssjúkrahúsinum fram til 2010 fyri at bjarga bygningunum og fyri at geva sjúklingunum tey tilboð, sum teir eiga at kunna fáa, sigur nevndin*

Fær Landssjúkrahúsið ikki eina álvarsliga, fíggjarliga innspræning nú, fer tað at fáa óbótaligar avleiðingar fyri okkara høvuðssjúkrahús.

Hetta staðfestir ein frágreiðing, sum serfrøðingar hava gjørt fyri bygginevndina á Landssjúkrahúsinum.

Og tað er ikki hissini fíggjarlig innspræning, sum serfrøðingarnir meina við.

Tí teir siga, at tað er átrokandi neyðugt at játta landssjúkrahúsinum heilar 500 milliónir tey næstu árini, fram til 2010.

Hetta er peningur, sum bæði skal brúkast til útbyggingar, umbyggingar, viðlíkahald og ikki minst, til ábøtur.

Serfrøðingarnir siga, at tað er brúk fyri íløgum á Landssjúkrahúsinum upp á næstan 430 milliónir krónur tey næstu árini til útbyggingar, umbyggingar, viðlíkahald og til ábøtur.

Men harafturat verður varisliga mett, at tað er neyðugt at játta einar 75 milliónir til at lúka tey brunateknisku krøvini í sambandi við útbyggingina.

Hetta eru øgilig tøl, men so skal eisini vísast á, at aftaná útbyggingina, eru bygningarnir hjá Landssjúkrahúsinum heilar 48.000 fermetrar til støddar.

Tilsamans sigur nevndin, at hesi árini verður neyðugt at brúka runt roknað 208 milliónir til umvælingar og ábøtur, 109 milliónir til útbygging, 44 milliónir til umbygging og 68 milliónir til vanligt viðlíkahald.

## 43 milliónir næsta ár

Bygginevndin sigur, at hon hevði lagt ein langtíðarætlan fyri útbyggingini.

Í hesum fíggjarárinum hevði nevndin mælt til at seta 30 milliónir av til umbyggingina.

Men tað blivu bara 10 milliónir settar av.

–Næsta ár verður sostatt neyðugt at seta 43 milliónir av til útbyggingina fyri at tað skal kunna bera til at tryggja eina framhaldandi gongd í byggingini.

–Bygginevndin mælir staðiliga frá at toyggja útbyggininga longur enn til til, tí verður hon ikki liðug tá, fer tað helst at fáa álvarsligar avleiðingar byggikostnaðin, og „aktualitetin í innrættingini og funktiónsloysnum“, sum nevndin málber seg.

Í sambandi við útbyggingina er tað eisaini neyðugt at umbyggja sjúkrahúsið sum er, fyri at fáa allar bygningarnar at virka sum eina heild, so at virksemið kann verða undir hóskandi umstøðum.

Bygginevndin sigur, at tað er neyðugt at fara undir umbyggingarnar, áðrenn útbyggingin er liðug fyri at arbeiðið ikki skal draga út og darva darva virkseminum á landssjúkrahúsinum.

-Bygginevndin ætlar, at umbyggingin skal byrja í 2002 og skal vera liðug í 2006.

## Er afturútsiglt

Bygginevndin sigur, at tað er neyðugt at útbyggja Landssjúkrahúsið, tí, sum er, er tað ov lítið pláss til sjúkuavgerðir og til sjúkuviðgerðir.

Men tað er eisini ov truppult at hjá sjúklingum at sleppa til Landssjúkrahúsið.

Og umstøðurnar hjá bæði sjúklingum og starvsfólkum eru ótíðarhóskandi, samstundis sum plásstrotið forðar fyri rationaliseringum og forðar eisini fyri at fleiri serøki kunnu mennast.

– Økta vitanin og teknologiska menningin setur framhaldandi krøv til plássið á Landssjúkrahúsinum.

Eitt nú krevja nýggir viðgerðarhættir størri skurðstovur og størri hjárúm, enn eru til taks í dag.

Orsaka av plásstroti, eru aðrar funktiónir spjaddar ymsastaðni í húsinum og tað er sera óheppið og óratonelt

Landssjúkrahúsið hevur heldur onga veruliga skaðastovu og er tí illa atkomiligt hjá viðskiftafólki.

– Sum er, nøkta hølini, sum eru til taks í dag, verri enn so tørvin, og sum er, ber tað hvørki til at rationaliserað ella at at dagføra funktiónirnar. Av tí sama er tað eisini tungt, fyri ikki at siga ógjørligt at byggja upp nýggj medisinsk øki, sum landsins borgarar áttu at havt atgongd til, sigur Bygginevndin á Landssjúkrahúsinum.

## Stendur at rapa

Niðurstøðan hjá bygginevndini um standin, sum bygningarnir hjá Landssjúkrahúsinum eru í, kann ikki skiljast øðrvísi, enn, at tað rætt og slætt stendur at rapa.

Nevndin sigur, at bygningarnir eru kannaðir og úrslitið er, at støðan er so ring, at nakað munagott má gerast heilt skjótt, skulu teir ikki fara heilt fyri skeyti.

Og nevndin vísir á, at her er talan ikki um nakra nútímansgerð, men bara um at seta bygningarnar í nøkunlunda sama stand, sum teir vóru í, tá ið teir vórðu bygdir.

–Bygningarnir eru í flestu førum bygdir eftir útlendskari fyrimynd, men hesin byggiháttur er ikki hóskandi til tað føroyska veðurlagið.

– Og tá ið tað hartil er gjørt so lítið fyribyrgjandi viðlíkahald, eru bygningarnir nú nú í so ringum standi, at tað krevur stórar upphæddir at seta teir í stand.

Sjálvt Landssjúkrahúsið hevur brúk fyri umleið 58 milliónum til umvælingar, tænastubygningarnir hava brúk fyri 50 milliónum, psykiatrisku deildirnar hava brúk fyri næstan 40 milliónum, íbúðarblokkarnir fyri gott 50 milliónum og uttandura innleggingar hava brúk fyri góðum seks milliónum til umvælingar.

Og bygginevndin hevur eisini eina ætlan fyri, hvussu nógvan pening tað er neyðugt at seta av, hvørt av teimum komandu árunum.

Bæði næsta ár og í 2002, verður neyðugt við umleið 60 milliónum hvørt árið. Og í 2003 verður harafturat brúk fyri knøppum 60 milliónum.

Í 2004 verður brúk fyri 50 milliónum og í 2005 verður brúk fyri gott 40 milliónum.

Í 2006 verður brúk fyri 35 milliónum og í 2007 verður brúk fyri 30 milliónum. Í 2008 verður brúk fyri gott 20 milliónum, í 2009 25 milliónum og í 2010 verður brúk fyri 20 milliónum til ymsar íløgur á Landssjúkrahúsinum og til viðlíkahald.

Nevndin sigur, at her er ikki ein spurningur um eitt val um, at vit kunnu antin byggja út, ella umvæla.

Tað er neyðugt at gera bæði fyri at geva Landssjúkahúsinum hóskandi karmar og fyri at bygningarnir ikki skulu fara enn verri.

Lagt verður afturat, at um farið verður undir eina skipaða umvæling av bygningunum, kann roknast við, at viðlíkahaldsútreiðslurnar minka so hvørt sum bygningarnir verða settir í stand, inntil viðlíkahaldið er komið niður á eitt natúrlit støði og tá verður kostnaðurin nógv lægri enn hann er nú.

Men fortreytin fyri hesum er, at eitt fyribyrgjandi viðlíkahald verður sett í verk, sigur Bygginevndin.

Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"

Fæst eisini sum vøruvognur
EINANS 187.800,-

Multibilurin til einhvørja loysn
Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.
3 ára garanti/100.000 km. garanti

EINANS 225.800,-
Rætti bilurin til mong endamál.
–Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn Tlf. 310600

Sosialurin - 311820



# Skilir landsstýrismannin

*Rutustjórin hjá Maersk Air sigur, at hann skilir væl, at Finnbogi Arge, landsstýrismaður, vil hava longri tíð at umhugsa, um hann skal geva Maersk Air loyvi at selja føroyingum bíligar ferðaseðlar. Men hann ásannar, at møguleikin hjá føroyingum fyri eini bíligari páskaferiu er farin*



*Rutustjórin hjá Maersk Air, Keld Mosgaard Christensen, skilir væl, at Finnbogi Arge vil hava betri tíð at hugsa seg um. Men hann vónar tó eina skjóta avgerð*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

EDVARD JOENSEN

Finnbogi Arge, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur avgjørt ikki at geva Maersk Air loyvi at selja føroyingum bíligar ferðaseðlar nú beinanvegin.

Umsóknin kom við sera stuttum skotbrái, og Finnbogi Arge metir, at hann skal hava betri tíð at umhugsa málið. Tí hevur hann avgjørt at bíða við at geva Maersk Air loyvi at fara undir søluátakið nú um páskirnar.

Rutustjórin hjá Maersk Air, Keld Mosgaard Christensen, sum legði ætlanina fram á tíðindafundi á Hotel Hafnia mikudagin, sigur, at hann skilir væl Finnboga Arge, landsstýrismann.

Keld Mosgaard Christensen sigur, at hann enn ikki hevur fingið svarið frá Finnboga Arge, landsstýrismanni. Men tá tað kemur, fer hann at nærlesa tað og vita, hvat hann so kann gera.

Keld Mosgaard Christensen ásannar, at teir vóru ógvuliga seinir við umsóknini. Men hann væntar kortini, at landsstýrismaðurin fer at viðgera málið við vælvild. Serliga tá vísast kann á rættiliga stóran áhuga millum føroyingar at sleppa at ferðast bíliga millum Føroyar og Danmark.

»Eg skal ikki kalla tað telfonstorm. Men tað hava rættiliga nógv fólk ringt til Maersk Air søluskrivstovurnar, bæði í Føroyum og í Danmark, og hava ætlað sær ein bíligan ferðaseðil«, sigur Keld Mosgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air við Tíðindablaðið Sosialin.

Hóast hann væl skilir og eisini góðtekur, at landsstýrismaðurin vil hava longri umhugsunartíð, vónar hann kortini, at ein avgerð verður tikin skjótt. Og sjálvandi vónar hann játtandi svar upp á umsóknina.

Tí hóast páskaátakið ikki verður til nakað, er framvegis hitt átakið, »Ferðist tvey og gjaldi fyri ein«, eftir. Tað tilboðið var ætlað at galda frá 28. apríl til 19. juni.

Í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin í gjár, segði Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, at Maersk Air arbeiðir óseriøst, tá teir koma við slíkum tilboðum og bíða um so stutta freist.

Keld Mosgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air, hevur onga viðmerking til ta meiningina hjá Magna Arge.

Hinvegin sigur hann, at tað er ikki rætt, tá Magni Arge sigur, at Maersk bjóðar ferðaseðlar fyri dumpingprís.

Tað er rætt, sigur Keld Mosgaard Christensen, at hesir prísirnir eru sera lágir. Men tað er eisini bara eina heilt ávísa tíð, tey bjóða hesar prísirnar. Og tað er bara fyri at royna at fylla tey tómu setrini, flogfarið annars flýgur við.

Tað er frægari at fáa trý fólk at ferðast bíliga, enn ongan at fáa fyri fullan prís. Tann økta ferðslan fer at viga upp í móti tapinum, sum annars hevði staðist av teimum tómu stólunum.

Keld Mosgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air, sigur, at hann er ikki heilt samdur við Magna Arge, tá hesin sigur, at kappast verður undir ójøvnum fyritreytum. Maersk Air hevur ikki biðið nakran í EU um at avmarka, hvør skal flúgva har niðri. Hevur Atlantsflog hug at flúgva millum europeiskar floghavnir, er felagið vælkomið, sigur hann. Maersk Air hevur so nógvar kappingarneytar har frammanundna, at ein aftrat ger ongan mun.

Tað, hann vildi, sigur Keld Mosgaard Christensen, var tað beint øvugta. At sleppa av við eina avmarking, sum er galdandi á Føroyarutuni.

Um Magni Arge, stjóri á Atlantsflog heldur, at Maersk Air bara kann stinga hondina í lumman hjá A. P. Møller eftir pengum, tá tað nýtist, fer hann skeivur, sigur rutustjórin hjá Maersk Air.

Væl er Maersk Air eitt felag í A.P.Møller koncernini. Men felagið hevur egnan búskap.

»Longri er tann søgan ikki«, sigur Keld Mosgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air.

TEY BESTU TILBOÐINI TIL KONFIRMANTARNAR

KONFIRMATIÓNS-TILBOÐ
PHILIPS
Stereoanlegg
MZ 7 - 2 x 50 w
• Hátalarar
• Radio
• CD
Vanl. prísur: 6.450,-
NÚ EINANS: 4690,00
Spar 1760,-

KONFIRMATIÓNS-TILBOÐ
Ericsson
GSM fartelefon
T10
• 7 ringitónar
• Vibrator
• Dual Band
NÚ EINANS: 1990,00

Motorola
GSM fartelefon
AM3180
• Fax/data 9600 bps • SMS
NÚ EINANS: 945,00

Yamaha
Western
Guitar
F310
Alt hetta fylgir við:
• Taska • Reim
• Stemmufloyta
• Eyka streingir
• Streingjavindari
Vanl. prísur: 2490,-
NÚ EINANS: 1990,00
Spar 500,-

KONFIRMATIÓNS-TILBOÐ
JVC
Boomblaster
RV-B99
• CD/Bandupptakari
• Radio
• Fjarstýring
• Ljóðið yvir øllum ljóðum
NÚ EINANS: 2950,00

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

petur & petur • 320870 - Fyrivarni verður tikið fyri útseldum vørum og villum.